## Gull-radio á Rás2

Størsta partin av degnum í dag sleppa føroyameistararnir úr HB at fylla sendiflatuna hjá Rás2. Longu klokkan 11.10 fyrrapartin hevði Heri Simonsen fyrstu gestirnar í rásarúminum, og allan dagin fer prátið at snúgva seg um HB, meðan bæði verandi og fyrrverandi HB-kempur vitja í rásarúminum. Rás2 ger eisini nógv burturúr, nú fótbóltsárið endar. 27. útgávan av 3. hálvleiki fer í luftina klokkan 16.30 leygardagin, og sunnukvøldið verður sjálvandi sent beinleiðis, tá stóra fótbóltsveitslan verður hildin í Bowling-høllini.

RÁS ...títt radio

## Byrja klokkan 14.30

Allir dystirnir í Vodafone-deildini leygardagin byrja klokkan 14.30. Tað gjørdi Kappingarnevndin hjá FSF av, tá hon ásetti, hvussu spælast skuldi seinastu trý umførini av landskappingini. Somuleiðis eru fastar klokkutíðir settar á, nær dystirnir í hinum fremstu deildunum verða spældir. Hjá kvinnum verður byrjað klokkan 12.15, og hjá 1. deild monnum verður blást ígongd klokkan 12.30.



# Pápin størsti kritikarin

Hóast tað gongur væl hjá Finni Justinussen í løtuni, so er ein, sum altíð er klárur at greiða frá, hvat áloyparin burdi gjørt øðrvísi. Tað er nevniliga ein av monnunum, sum skoraðu í steypafinaluni í 1996. Júst sum Finnur gjørdi í ár.

– Eg og babba plaga at tosa saman aftaná dystirnar. Hann plagar at vera raskur at fortelja mær, hvat eg skuldi gjørt øðrvísi. Og eg royni at lurta, hóast tað kann vera torført at fáa at vita, hvat mann ger skeivt, men klári eg at lurta, so læri eg nokk okkurt, staðfestir Finnur Justinussen.

– Eg kann siga, at tað gongur væl hjá honum, men eg haldi mann gott kann siga, hvat hann kundi gjørt øðrvísi. Tað sær út sum, at hann roynir at lurta, tí onkuntíð síggi eg okkurt, sum eg havi fortalt honum, staðfestir Símun Petur Justinussen.

Um gongdina hjá Finni heldur pápin, at tað onkursvegna er hansara skuld, at sonurin skorar so nógv mál.

– Nú havi eg reypað í so nógv ár. Tí er bara eitt at gera, nú hann hevur fingið møguleikan, staðfestir erni pápin.

**Feðgarnir, Finnur og Símun Petur Justinussen hava til felags, at teir báðir hava skotið mál í steypafinalunum**

*– Eg havi bara fingið tvey gul kort, og eitt var fyri at lata meg úr blusuni.*

*– Tá mann hevur hugt at gullgagguni hjá pápa sínum í 17 ár, sigur tað seg sjálvt, at mann verður motiveraður.*

kanska serliga í summar, tá eg spældi fýra dystir uttan at skora, at eg føldi trýstið. Men allir áloyparar fáa niðurtúrar, og so má mann bara arbeiða við tí.

### Veikleikar

Tað gongur sera væl hjá gøtudronginum í løtuni, men hann er greiðir yvir, at hann framvegis hevur sera nógv at læra.

– Eg veit, hvar málið er. Problemið er bara at finna viðleikararnar. Tað er nokk hugflogið í spælinum, sum er nakað lítið, og so eri eg heldur ikki nógv kropssterkur, greiðir Finnur Justinussen frá, og staðfestir, at hetta er nakað nógv verður arbeitt við.

– Men tað er heldur ikki so, at eg bara fari at spæla til hinar. Eg skjóti sjálvur, tá møguleikin er nóg stórur, men hevur onkur annar størri møguleika at skora, so umhugsi eg støðuna.

### Dómarin fær sítt

Hóast tað er fyrsta árið hjá Finni Justinussen í bestu deildini, so fer hann altíð til markið. Bæði viðvíkjandi rangstøðu og tá tað kemur til at vinna ein bólt.

– Tað súrasta sum er, er tá mann hevur skotið eitt mál, og síðani fær at vita, at tað er offside. Tá er rættiliga skjótt at fara eftir linjuverjanum. Og í kropsliga spælinum fari eg sjálvandi til markið, men eg havi bara fingið tvey gul kort og eitt var fyri at lata meg úr blusuni, sigur helst komandi toppskjúttin.

Hann leggur afturat, at tað kann tykjast ósmæðið, men tað er ein partur av spælinum.

*– Sjálvandi kenni eg eitt trýst, tí fólk vænta at eg skori. Tað var kanska serliga í summar, tá eg spældi fýra dystir uttan at skora, at eg føldi trýstið*

### Tolin mamma

Líka síðan Finnur Justinussen var heilt lítil, hevur hann nærum búð á vøllinum í Sarpugerði.

– Mamma hevur nokk funnið seg í at eg eri komin seint til døgverða, og havi verið øgiliga nógv úti, men eg giti, at hon hevur verið von við tað frá tí, at babba spældi, flennir Finnur Justinussen.

Finnur er yngstur av trimum systkjum, og hóast bæði systirin og beiggin spæla og hava spælt fótbólt, so er tað bara tann yngsti, sum veruliga hevur sligið ígjøgnum.

### Besta spælið

Hóast ungi gøtumaðurin hevur svomið fyrr og er rættiliga sjálvssøkin sum fótbóltsleikari, so staðfestir hann, at liðspælið fótbóltur er hansara spæl, tí í svimjingini gekk bara væl í staffet.

– Eg veit at nógv, serliga konufólk, halda fótbólt vera nakað fjas, men eg haldi at tað er heimsins besta spæl. Kenslan at skora mál, og tað at tú ongantíð kanst siga nakað frammanundan. Tú verður altíð yvirraskaður av onkrum, og tí er tað so stuttligt, heldur Finnur Justinussen.

## 19 skjótir spurningar

**Navn:** Finnur Justinussen
**Føðidagur:** 30/03-1989
**Hædd:** 181 sentimetrar
**Vekt:** 74 kilogramm
**Skógvastødd:** 42,5
**U21 dystir:** Tveir
**Foreldur:** Gudny Fríða og Símun Petur Justinussen
**Starv:** Handilsskúla-næmingur
**Styrkir:** Luftspæl og kaldur frammanfyri málinum
**Veikleikar:** Styrki og vantandi hugflog
**Størsti dreymur:** At koma so langt, sum eg kann
**Besta mál:** Unglingum í fjør. Saksaði bóltin í trýkantin og inn ímóti AB
**Fyrsti dystur:** Ímóti B71 í Gøtu í 2007. Fekk einar 10 minuttir
**Besti dystur:** Steypafinalan í ár
**Ringasti dystur:** Tað var í smádreingjum, tá vit taptu 1-24 ímóti HB. Vóru á odda 1-0 at byrja við
**Ringasti mótstøðumaður:** Bartal Eliasen
**Besti viðleikari:** Súni Olsen
**Idol:** Allan Shearer
**Yndislið:** Manchester United





Tað er soleiðis vit kenna Finn Justinussen best. Púra leysur setir hann bóltin í málið